

# Fantastiskt

## Guðrun

Tað letur seg gera at hava eina altjóða mótasýning í Føroyum. Tað hava Guðrun og Guðrun nú prógvað.

Alt tiltakið var óalmindiliga væl skipað -heilt niður í minstu smálutir, og hugsað var um alt. Hetta var eisini nakað, sum fremmandu gestirnir, sum ikki gera annað enn at ganga til altjóða mótashow, løgdu til merkis. – Vit kenna okkum forkelað, og alt tiltakið hevur verið heilt fantastiskt, var ein av viðmerkingunum.

Gestirnir vóru allir stak væl nøgdir, og øll tyktust hava fingið eina uppliving fyri lívið. Flestu viðmerkingarnar vóru, at hetta var nakað heilt serstakt, soleiðis at verða flogin til eitt annað land til eina mótasýning, og fólk søgdu seg vera bæði glað og ærað at vera boðin við til hetta stóra tiltakið.

Tey mótakønu, sum Rás2 tosaði við, vóru á einum máli um, at hetta avgjørt fór at lata nakrar hurðar upp fyri Guðrun&Guðrun úti í heimi. So sigast má, at tiltakið eydnaðist til fullnar.



*Heilt løttu bundnu kjólarnir, sum eru vørumerki hjá G&G uttanlands, vóru eisini at siggja í heystkollektiónini 08. Men tær hava heilt víst flutt seg víðari og hava ment úttrykkið í klæðunum*

*Stjørnutroyggjan, ið gjørdist kend frá Forbrydelsen, er nú eisini at fáa sum vestur*



